YRKISdepilin

# Upprit um skúlagongdina innan smásøluyrkið

## Tilevnað av arbeiðsbólki settur av Yrkisútbúgvingarráðnum

Latin Yrkisútbúgvingarráðnum og Mentamálaráðnum
í mai mánaða 2008

**Inngangur**

Yrkisútbúgvingarráðið samtykti á fundi 23. juni 2004 – at seta ein arbeiðsbólk at kanna, um tað var møguligt, at skúlagongdin innan smásøluyrkið, sum fer fram á donskum skúla, kann takast á føroyskum skúla. Tilráðing var løgd fram um hesi viðurskifti í juni mánaða 2006, har tað var tilrátt at øll skúlagongdin innan smásøluyrkið átti at veri í Føroyum. Hetta hevði verið við til at ment og styrkt profilin á Føroya Handilsskúla og givið skúlanum og føroysku handilsvinnuni ein møguleika til at ment undirvísingina á økinum – serliga við atliti at føroyskum viðurskiftum.

Yrkisútbúgvingarráðið hevði fund 19. juni 2006, har hetta mál var til viðgerðar, og er hetta brot úr gerðarbókini frá tí fundinum: *Ráðið góðkendi tilráðingina. Tikið varð undir við tilmælinum frá arbeiðsbólkinum um at settur verður ein arbeiðsbólkur (fyribilsnevnd), sum skal koma við tilráðing, um mælt skal verða myndugleikunum til, at gjørd verður ein føroysk undirvísingarskipan fyri smásøluyrkið, og at skúlagongdin innan hetta yrkið skal fara fram í Føroyum. Mælt verður til, at fyribilsnevndin, umboðandi somu áhugabólkar, sum arbeiðsbólkurin um skúlagongdina, verður liðug við sítt arbeiði fyri ársskiftið 2006/2007.*

Hesin bólkur bleiv settur 21. november 2007 og hevði sín fyrsta fund 10. januar 2008 og hevur síðani hildi 4 fundir, samskiparin og Sonja hava tó hildið fleiri fundir við fyrieiking av skipanini til arbeiðsbólkin at viðgera.

Í arbeiðsbólkinum eru:

Mortan Zachariassen, Mentamálaráðið
Sonja Oyrabø Petersen, Føroya Handilsskúli
Pætur Niclassen, S&K felagið
Tummas Hanus Dam, Føroya Arbeiðsgevarafelag.
Skrivari/Samskipari hjá arbeiðsbólkinum er Eyðun Gaard, leiðari í Yrkisdeplinum.

Arbeiðssetningurin hjá arbeiðsbólkinum er:

**at koma við einari tilráðing um, hvussu ein føroysk undirvísingarskipan kann setast í verk innan smásøluyrkið, og koma við tilráðing um hvussu skúlagongdin innan hetta yrki kann / skal skipast.**

Arbeiðsbólkurin hevur kannað, í hvønn mun tað er møguligt at gera eina skipan í Føroyum, sum í mest møguligan mun tekur støðið í føroyskum viðurskiftum. Tvs. at teir lærlingar sum koma at ganga á Føroya Handilsskúla eru minst líka væl um ikki betur fyri eftir lokna útbúgving, enn um teir tóku skúlagongdina á donskum handilsskúla. Her verður hugsa um møguleikan at viðgera føroysk handilsviðurskiftið, ið má vera betur fyri bæði handilslív og samfelag.

## Grundgevingar fyri at seta útbúgvingarnar á stovn

**Næmingagrundarlagið**
Um hugt verður at hagtølunum seinastu 10 árini sær tað soleiðis út:

| *Øki* | *1998* | *1999* | *2000* | *2001* | *2002* | *2003* | *2004* | *2005* | *2006* | *2007* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Heilsøla | 8 | 7 | 12 | 9 | 12 | 22 | 11 | 10 | 31 | 20 |
| Smásøla | 16 | 27 | 33 | 25 | 29 | 25 | 23 | 31 | 41 | 35 |
| Skrivstova | 18 | 35 | 39 | 45 | 53 | 35 | 34 | 17 | 35 | 58 |
| *Tilsamans* | *42* | *69* | *85* | *77* | *94* | *82* | *68* | *58* | *107* | *113* |

Sum tað sæst á tilgongdini til heil- / smásølu og skrivstovuyrkið, so hevur hon verið javnt stór seinastu árini, og tí er næmingagrundarlagið tilstaðar.

Vit hava greina tølini fyri tilgongdina seinastu 2 árini nærri og kannað, um tað er møguligt at finna nakrar felagsnevnarar í útbúgvingunum, so at møguligt er hjá Føroya Handilsskúla at byrja við eini royndarskipan við tveimum flokkum tann 1. januar 2009.

Fyri útbúgvingarnar søluatstøðari og handilsatstøðari síggja tølini soleiðis út.

| **Byrjar** | **Endar** | **Søluatstøðari** | **Handilsatstøðar i** |
|---|---|---|---|
| 2006 | 2009 | 4 | |
| 2007 | 2011 | 31 | |
| 2008 | 2012 | 2 (mars 08) | |
| | | | |
| 2006 | 2010 | | 10 |
| 2007 | 2011 | | 12 |
| 2008 | 2012 | | 2 (mars 08) |

Nakrir av hesum lærlingum hava verið niðri á skeiðið, tí má tað gerast ein ætlan fyri hvønn einstakan (einstaklingaætlan), men er tað ongin ivi um at lærlingagrundarlagið er til staðar, og tað tí er møguligt at skipa tveir flokkar innan hesar útbúgvingar við ársbyrjan 2009.

**Fíggjarligar avleiðingar**

| | |
|---|---|
| **Útreiðslurnar hjá Føroya Handilsskúla** | |
| Ein lærlingaflokkur kostar umleið 60.000 kr um árið. | 120.000 kr. |
| Tá hølistrot er á Føroya Handilsskúla, noyðist hann at leiga hølið í býnum – útreiðslurnar av tí er umleið 1800 til 3000 kr. um dagin. | 60.000 kr. |
| Fyri at seta seg inn í hesar útbúgvingar og viðurskiftini teimum viðvíkjandi í Danmark, er ein arbeiðsbólkur mannaður av starvsfólki á Føroya Handilsskúli noyddur at fara niður at kunna seg um viðurskiftini. | 40.000 kr. |
| **Tilsamans** | **220.000 kr.** |
| | |
| **Útreiðslurnar hjá Yrkisdeplinum** | |
| Gera kunngerð og lesiætlan samstundis sum royndarskipanin verður skipað | **20.000 kr.** |
| **Tilsamans** | **20.000 kr.** |
| | |
| **Útreiðslur hjá báðum stovnum tilsamans** | **240.000 kr.** |
| | |
| **Inntøkur hjá Yrkisdeplinum ella spardar útreiðslur** | |
| 3500 kr. * 50 lærlingar * 1,5 skúlaskeið | **262.500 kr.** |
| Sparing: (262.500 – 240.000) | **22.500 kr.** |

Talið 262.500 kr. skal skiljast soleiðis. Fyri hvørt skúlaskeið í lærlingurin fer til Danmarkar fær lærumeistarin 3500 kr í ferðastuðli, og um vit hugsa okkum, at ein lærlingur fer niður til eitt skúlaskeið og samstundis helvtin av teimum fer til fakroyndina, so eru longu 1,5 skúlaskeið hjá hesum lærlingum spard í ferðaútreiðslum. Sostatt verður ein sparing uppá 22.500 kr. bert við hesum tveimum flokkunum. Leggjast skal afturat at 1,5 skúlaskeið um árið er lágt sett.

Samlaðu útreiðslurnar til ferðastuðul er 1.150.000 kr. um árið á fíggjarlógini, og verður tað rokna við at 123 lærlingar innan handil og skrivstovu fara niður í skúla í 2009, tað gevur eina útreiðslu uppá 645.750 kr. sí útgreining niðanfyri.

| | |
|---|---|
| ***Handil / skrivstova*** | |
| lærlingatilgongd (sí talvu niðanfyri) | 237 |
| harav 60% er skrivstovuútb. Av hesum fara 20% til DK | 28 |
| harav 40% er handilsútb. Av hesum fara 30% til DK | 95 |
| tils. skúlagongd í Danmark | 123 |
| ferðagjald tils. (1,5 ferðir pr. lærling pr. ár) | *645.750 kr.* |

Lærlingar ið fara til Danmarkar í skúla:

| ***Handil / skrivstova*** | |
|---|---|
| 2007 (helvtin) | 62 |
| 2008 | 125 |
| 2009 (helvtin) | 50 |
| ***samanlagt*** | ***237*** |

Um meginparturin av hesum lærlingum kunnu taka skúlaskeiðini í Føroyum, kemur hesin peningur at vera her í samfelagnum og geva eina synnergi effekt í skúlavirksemi og samfelag her heima.

Í royndarárinum kemur Yrkisdepilin at hava eina útreiðslu av kunngerðar arbeiðinum, og er tað ein eingangs íløga. Men Yrkisdepilin hevur eisini skyldu til at útvega metingardómarar til yrkisroyndirnar, og koma tær at vera fleiri í talið í framtíðini, um flestu lærlingar taka skúlagongdina í Førøyum. Tí skal roknast við, at Yrkisdepilin í framtíðini vil hava eina útreiðslu til metingardómarar, og eru teir samsýntir, sum hetta dømi vísur.

Dømi:
Í 2011 verða 43 lærlingr lidnir við útbúgvingina og skulu metingardómarar samsýnast fyri hesar, tað gevur (4 tímar/lærling*185,504 kr.* 43 lærlingar) = 31.906,69 kr.

**Innihald í útbúgvingini:**
Útbúgvingarnar eru skipaðar í tveir partar:

FHS er fyrsti partur, sum flestu lærlingar hava frammanundan, teir fara í læru, og um teir ikki hava FHS áðrenn, so verður fyrsti patur tikin saman við øðrum parti.

Annar partur av útbúgvingini er, tað sum danir kallað *hovedforløbet,* og verður tað skipa á sama hátt sum í Danmark við skúlaskeiðum. Fyri at síggja lærlinga grundarlagið taka vit tað við einaferð enn, saman við kravdum / ikki kravdum sergreinum.

**2. partur av lærlingaútbúgvingini uttan profil**

| **Endar** | **Byrjar** | **Søluatstøðari** [1] | **Handilsatstøðari, søla**[2] |
|---|---|---|---|
| 2009 | 2006 | 4 | |
| 2011 | 2007 | 31 | |
| 2012 | 2008 | 2 | |
| 2010 | 2006 | | 10 |
| 2011 | 2007 | | 12 |
| 2012 | 2008 | | 2 |
| **Innihald og tíðarskeið**:<br><br>Kravdar sergreinir[3] herav hesir eru felags fyri SA og HA:<br><br>3 vikur Sølurááðlegging<br>1 vika Persónlig søla | | 3 x 2 vikur = 30 dagar<br>**Kravdar sergreinir fevna um høvuðsheitini**:<br>-Viðskiftafólkastreymur<br>-Vørustreymur<br>-Upplýsingarstreymur<br>-Peningastreymur | 2 x 2 vikur = 20 dagar<br>**Kravdar sergreinir fevna um høvuðsheitini**:<br>-Viðskiftafólkastreymur<br>-Vørustreymur<br>-Upplýsingarstreymur<br>-Peningastreymur |
| Ikki kravdar sergreinar | | 1 – 2 vikur = 5-15 dagar | 3 – 7 vikur = 15-35 dagar |
| Yrkisroynd | | 1 vika | 1 vika |
| **Dagar tilsamans uttan yrkisroynd** | | **35-45 dagar** | **35-45 dage** |

Talvan omanfyri vísur, hvussu nógvir lærlingar eru, nær teir byrja og enda læruna. Eisini er sett upp, hvussu nógvar vikur verða brúktar til kravdar og ikki kravdar sergreinar og yrkisroynd.

Talvan vísir eisini, hvørji høvuðsheitið tær kravdu sergreinirnar fevna um bæði fyri søluatstøðara og handilsatstøðara. Til tær ikki kravdu sergreinarnar, er vanligt at tey bert velja eina viku fyri søluatstøðara og 3 vikur fyri handilsatsøðara. Og hevur Føroya Handilsskúli eisini lærarar til hesar sergreinar. Fótnoturnar vísa til tær einstøku kunngerðirnar, sum vera nýttur í Danmark nú, og verður tað í fyrstu atløgu grundarlagið undir útbúgvingunum, til føroyskar kunngerðir eru gjørdar.

Meðan royndarskipan er, verður farið undir at gera nágreiniligari lesiætlanir saman við m.ø. lærumeistarum, sum Føroya Handilsskúli skal hava neyvt samstarv við. Men áðrenn verður

[1] Bekendtgørelse om uddannelserne i den erhvervsfaglige fællesindgang merkantil – BEK nr. 149 af 04/03/2008 Bilag 1 § 4.1.1-12

[2] Bekendtgørelse om uddannelserne i den erhvervsfaglige fællesindgang merkantil – BEK nr. 149 af 04/03/2008 Bilag 1 § 4.2.1-20

[3] **Undervisningsministeriet 11. juli 2007**: Vejledning til bekendtgørelse nr. 1264 af 22. marts 2004 om Detailhandelsuddannelse med specialer og
**Undervisningsministeriet 5. juli 2007**: Vejledning til bekendtgørelse nr. 1049 af 01/11/2004 om Handelsuddannelse med specialer J. ne. 161.984.021

skipað fyri einari kanningarferð til Danmarkar, fyri at vit kunna síggja, hvussu verður gjørt viðv. lærlingaútbúgvingum á øðrum skúlum.

Tað er av týdningi, at ein lærlingur, sum byrjar í Føroyum, eisini kann fullføra útbúgvingina her, og má tað vera eitt krav til royndarætlanina, eins og tað er eitt krav at útbúgvingin hevur millumlanda góðkenning.

Skrivstovulærlingarnir hava eina royndarskipan, har teir ganga í skúla hvønn hósdag, tilsamans 30 ferðir, í FSF-húsinum. Ætlanin er at brúka sama leist til sølu- og handilsatstøðingar, td. hvønn týsdag til søluatstøðingarnar og hvønn mikudag til handils-atstøðingarnar, tilsamans 35 týsdagar og 35 mikudagar, at byrja 1. januar 2009 og at halda fram í 2010. Á tann hátt hevur Føroya Handilsskúli tøkar lærarar, sum eru á FHS og HH frammanundan, og sum eru væl skikkaðir at undirvísa lærlingum.

**Kunning**

Yrkisdepilin fylgir við hvørjir lærusáttmálar vera gjørdir og hevur tí møguleika at kunna bæði lærupláss og lærling um tað føroyska skúlatilboðið, samstundis sum læruplássið meldar lærlingin inn á skúla. Tað er í løtuni frítt at melda lærling til góðkendan yrkisskúla, men verður tað ikki latin ferðastuðul um skúlatilboðið finst í Føroyum. Tí missa hesi lærupláss í framtíðini tann stuðulin, um tey framvegis velja at senda lærlingarnar niður i skúla.

**Íverksetan**

Ætlanin hjá arbeiðsbólkinum er, at Føroya Handilsskúli, við grundarlagi í hesum uppriti, skal søkja Mentamálaráðið um at byrja eina royndarskipan 1. januar 2009. Samstundis vera kunngerðir og lesiætlanir gjørdar fyri útbúgvingarnar, so at øll viðurskifti eru greið tá royndarætlanin er liðug og eftirmett. Ætlanin er at skipanin endaliga skal íverksetast 1. januar 2010.

Arbeiðsbólkurin metir seg tí við hesum uppritið at hava loyst arbeiðssetningin. Bólkurin leggur uppritið um íverksetan av útbúgvingunum innan smásøluyrkið í Føroyum fyri Yrkisútbúgvingarráðið til ummælis og Mentamálaráðið til víðari viðgerð. Samstundis sum heitt verður á Føroya Handilsskúla, at søkja um at kunna fara undir hesa royndarskipan.

Tórshavn mánadagin 23. mai 2008

| Tummas Hanus Dam | Pætur Niclasen | Sonja Oyrabø Petersen |
|---|---|---|

| Mortan Zachariassen | Eyðun Gaard |
|---|---|